tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 57 Hósdagur 21. mars 1996 70. árgangur Krónur 7,00

*Tróndur Djurhuus, Svf-stjóri:*

## Sleyg og skrøgg um Svf

**Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri loysir frá posabandinum í samband við málið um nýggju sjónvarpslógina, sum m. a. ber í sær, at einkarrætturin hjá Svf at senda sjónvarp verður varðveittur**

*Síða 2*

## Hon roynir at selja Føroyar

*Síða 6*



*Hildur Djurhuus við faldaranum um føroysku summarhúsini. Hon væntar góða undirtøku.*

## *Stríðið um læknastjóran:*

# Læknar geva ilt av sær



*Stríðið á Landssjúkrahúsinum heldur fram*

*Síða 3*

Læknar á Landssjúkrahúsinum góðtaka ikki, at Pál Weihe, læknastjóri verður settur úr starvi soleiðis sum Javnaðarflokkurin hevur skotið upp.

*Harald Snarvold frá AMG-oljusamtakinum:*

# Oljuberandi løg eru á føroyskum øki

- Somu oljuberandi løg, har olja er funnin í vestan fyri Hetland, halda fram á føroyskum øki, sigur Harald Snarvold, sum er kanningarstjóri hjá Enterprice Oil við Sosialin

*Síða 16-17*

*Harold Snarvold frá AMG oljusamtakinum sigur, at tey eru rættuliga vissir í, at tann lagdin, sum olja er funnin í vestan fyri Hetland heldur fram vestureftir og inn á føroyskt øki*



**Skorsteinssópari**

Ynskja tygum at fáa skorsteinin reinsaðan av fakmanninum?

Føroya Brunatrygging tatir sum treyt at fast avtala er um at reinsa skorsteinin árliga.

Tygum kunnu í hesum sambandi ringja og biðja um tíð at fáa skorsteinin reinsaðan.

Andrass á Krossbrekku
Tlf. 22456

◆ NÝGGI WALT DISNEY STÓRFILMURIN **TOY STORY** FRUMSÝNDUR 22. MARS ◆ Havnar Bio

*Harald Snarvold frá AMG-oljusamtakinum:*

# Oljuberandi løg hetlandsmegin markið halda fram inni á føroyskum øki

*– Vit eru nú rættiliga vísir í, at tann lagdin, sum olja er funnin í vestan fyri Hetland, heldur fram vestur eftir og inn á føroyskt øki. Spurningurin er bara, hvussu langt vestur hon gongur. Hetta er tað vit nú fara at kanna við seismikki, sigur Harald Snarvold, kanningarstjóri hjá Enterprice Oil, við Sosialin. Hann hevur júst verið í Føroyum fyri at kunna oljufyrisitingina um komandi kanningar hjá AMG-samtakinum*

Jan Muller

Millum tey seks oljufeløgini, sum hava vitjað í Føroyum hesa vikuna, eru tey trý feløgini í AMG-samtakinum, Statoil, Mobil og Enterprice.

AMG stendur fyri Atlantic Margin Group.

Tað var kanningarstjórin hjá Enterprice Oil í London, norðmaðurin Harald Snarvold, sum umboðaði tey trý oljufeløgini undir hesi vitjanini. Og ørindini vóru at kunna oljufyrisitingina um seinastu úrslitini hjá feløgunum og at leggja fram eina umsókn um at gera seismiskar kanningar á føroyskum øki í vár.

Harald Snarvold sigur við Tíðindablaðið Sosialin, at AMG-samtakið er komið rættiliga væl áleiðis við kanningunum á føroyskum øki. Hann dylur ikki fyri, at júst teirra samtak man vera komið longst við kanningunum á føroyskum øki. Hetta hendir samtíðis sum teir arbeiða framvið allari hellingini frá Vøring í Miðnoregi til Føroya-Hetlandsleiðina og víðari til Írlands.

-Vit hava verið við heilt frá byrjan og hava brúkt væl av pengum og orku til at koma víðari. Og nú er tað umráðandi fyri okkum at fáa meiri seismiskar kanningar gjørdar.

### Hava útvegað sær nógv tilfar

Snarvold vísir á, at teir hava keypt seismikk frá Western og euromagnetiskar kanningar frá World Geoscience, kanningar, sum gjørdar eru úr flogfari í fjør. Síðani hava teir sjálvir gjørt sokallaðar OBS-kanningar, sum er seismikkur, ið verður móttikin á sjálvum havbotninum.

-Tulkingin av øllum hesum tilfarinum hevur teknað eina rættiliga greiða mynd fyri okkum av serliga einum parti av tí føroyska økinum. Hetta er økið niðri í landsynningshorninum á føroyska landsgrunninum beint vestan fyri hvítu sonuna. Orsøkin til at myndin av undirgrundini her er mest klár er tann, at her er basaltið ikki so tjúkt. Her fara vit uppá eginhond í summar undir eina rættiliga umfevandi seismiska kanning.

Talan er um at skjóta nakrar túsund kilometrar av seismikki. Tað er seismikkfyritøkan Geco Prakla, sum skal gera kanningarnar við skipinum Geco My.




*Strikuttu økið eystan fyri fiskimarkið vísir, hvar oljufeløg hava funnið fleiri stórar oljukeldur, eitt nú Foinaven og Schiehallion. Strikuttu økið vestan fyri vísir somu oljuberandi løgini. Spurningurin er hvussu langt vestur hesi ganga. Pílurin vísir økið, sum vit hava teknað inn á kortið eftir samrøðu, har Statoil, Enterprice og Mobil í summar fara at gera seismiskar kanningar fyri at vita, hvussu langt vestur undir basaltinum tey oljuberandi løgini, sum eru staðfest á føroyskum øki, halda fram. Kortið er úr føroyska atlasinum.*

### Oljuberandi løg á bretskum øki halda fram føroysku megin

Harald Snarvold sigur, at teir hava peikað sær út eitt avíst øki, sum teir halda er serliga áhugavert. Verandi kanningarúrslit vísa, at tann legugrýtislagdin (sedimentbasengi), sum byrjar bretskumegin markið, har tær stóru oljukeldurnar Foinaven og Schiehallion liggja, heldur fram vestur eftir gjøgnum hvítu sonuna og síðani inn á føroyskt øki.

-Vit síggja tó bert nakrar "bitar" av hesi lagdini inni á føroyskum øki, tí tá vit koma nakað longur vestur eftir verður basaltið tjúkri og tjúkri, og tá er ringt at síggja, um lagdin heldur fram. Fyri at vita, hvussu langt vestur á føroyskum øki henda lagd gongur er neyðugt at hava meira nágreiniligar seismiskar kanningar. Og tað eru hesar vit fara at gera í summar.



*Halvor Snarvold er kanningarstjóri hjá oljufelagnum Enterprice, sum er partur av AMG-samtakinum. Mynd Jan*

Harald Snarvold sigur, at seta stórar vónir til hesar kanningar, tí tær eru avgerandi fyri, hvar teir meta tað vera best at seta borin í um eini tvey ár. Tað veldst so sjálvandi um, hvar teir fáa loyvi.

-Vit hava so valt at konsentrera okkum um hetta økið, tí tað er tað mest áhugaverda í løtuni. Nú vit við rættiliga stórari vissu vita, at oljuberandi løgini

